Sørvágs Kommuna
FO-380 Sørvágur

Kunningarskriv 2002

Góðu bygdafólk

Àrið 2002 er nú komið at enda, og gevur hetta okkum høvi til at líta aftur á farna árið. Tær vónir sum vit settu okkum við ársbyrjan verða uppgjørdar á ymiskan hátt, og ymiskt er hvussu hevur skorist, hettar eru tygum best til at meta um.

Á vegamóti
Valskeiðið hjá sitandi kommunustýrið er nú hálvrunnið, og her við árslok er hóskandi at líta aftur og taka samanum.
Ásannast má at allar tær ætlanirnar sum borgarin hevði vanta vóru framdar nú, enn ikki eru verðunleiki.
At "tíðin rennur sum streymur í á" og ikki bíðar eftir okkum kunnu vit øll ásanna, og skal eingin yvast í at undirritaðið, eins og flest øll onnur, kundi hugsa sær at fleiri av ynskjum okkara vóru avgreidd skjótari.
Tað hevur altíð verið og er, av stórsta tídningi at brúka tað neyðugu tíðina til at finna fram til loysnir sum kunnu bera framyvir, ístaðin fyri fyribilsloysnir, og av stórsta tídningi er at fara fram við varsemi tá ið talan er um nýtslu av peningi skattaborgarans.

Verður samborið við undanfarna ár er Sørvágur komin á eitt áhugavert vegamót:

- Fyri fyrstu ferð síðani seinast í 70`unum er áognin størri enn skuldin, hetta merkir at ætlanin frá fyrst í 90´unum um at fáa skuld okkara burtur er eyðnast fyrr enn nakar kundi rokna við.
- Vit hava stórt vinnuligt virksemi, í mun til aðrar kommunur, sum vit vanliga samanbera okkum við
- Vit hava í undanfarna árið merkt sera stóran áhuga fyri at seta búgv í kommununi.
- Vit eru nú samanbundin við meginøkið við undirsjóartunnli.

Her eru bert nevndar nakrar av teimum fyritreytum og avbjóðingum sum standa fyri durum.

Søguliga hevur Sørvágur ligið á fremstu rók í vinnu, menning og mentan. Skulu vit framvegis vera við til at ávirka menningina, er av stórum tídningi at vit taka av stóru avbjóðingum sum standa fyri framman.
Tað eru ídag fíggjarligar fyritreytir fyri framhaldandi menning av kommununu, men avgerðandi er at farið verður varliga fram, soleiðis at íløgur okkara vera gjørdar uttan at vit leggja ov stórar byrðar á framtíðina.

Bygdaráðsfundir
Bygdaráðið hevur havt ? fundir í farna ári. Sum undanfarin ár eru tey flestu byggimál. Tær fýra nevndirnar hava havt ? í farna árið. Á seinasta fundi sum var 11.12.02 eru nakrar broytingar gjørdar í nevndunum, umhvørvisnevndin er løgd saman við teknisku nevnd, og trivnaðarnevnd er komin afturat.

Fíggjarætlanin fyri 2003
Fíggjarætlanin hjá Sørvágs kommunu fyri 2003 var til seinastu viðgerð 28.11.2002 og endaliga samtykt. Skattskylduga inntøkan verður mett til 120.000.000 ímóti 110.000.000 fyri 2002 ein vøkstur uppá góð 8%. Ein fyrbils meting vísur at nakað meir kemur inn í skatti enn vit mettu fyri árið 2002.



Fíggjarætlanin fyri 2003 gevur eins og undanfarna ár eisini pláss fyri einum skattalætta. Skattaprosentið fyri 2003 verður lækkað við einum ¼ prosentið, og er nú komið niður á 19,75. Barnafrádrátturin verður óbroyttur 2.500 kr.
Ì fíggjarætlanin fyri 2003 er úrslitið áðrenn avdrátt mett til 2,3 mió. kr.



Rokniskapurin fyri 2001
Grannskoðaði rokniskapurin fyri árið 2001 var framlagdur og góðkendur á fundi tann ? . Ársrokniskapurin vísir eina javnvág uppá kr. 24.031.208. Eina fíggjarstøðu, sum javnvigar við 14.049.920 kr. Í fíggjarætlanini fyri 2001 var roknað við einum avlopi uppá 4.886.454 áðrenn avdráttir, og vísir rokniskapurin eitt avlop uppá 4.886.472
Hesi seinastu ársúrslitini hava betra munandi um gjaldførið hjá kommununi.
Aftur í ár hevur bygdaráðið valt at goldið 2,0 mió. kr. eyka niður av skuldini sum 31.12.02 er komin niður á 8,2 mió. kr.

Fólkatalið
Fólkatalið í bygdini er støðugt vaksandi, og er nú komið uppá 963 fólk, meðan somu tíð síðsta ár vóru 941 fólk, ein vøkstur uppá 22 fólk ella 2,3 % , nøkur fleiri búgva í bygdini, men eru ikki skrásett í kommununi, hesi viðurskifti vænta vit koma uppá pláss í komandi ári. Øll tit skulu verða hjartaliga vælkomin.

Ì bløðunum tíðliga í vár, var samrøða við undirritaða um frítíðarhús hjá uttanbíggjafólki. Hettar bleiv missjavnt móttikið. Teir eftirfylgjandi dagarnar var ein ávís ónøgd um tað sum bleiv ført fram. Sjálvandi skulu fólk hava sína meiningar um hesi viðurskiftir, men trupuleikin við búðstaðarviðurskiftum er næstan líka stórur í dag sum hann var fyri einum ári síðan, og enn einaferð vil kommunan heita á fólk um at útleiga síni tómu hús.

Sum bygdafólkunum kunnugt eru nógv sethús bygd í árinum sum farið er. Mett út frá avgrevstrum og givnum byggiloyvum, er talan um eini 14 sethús sum eru í gerð ella verða liðugtgjørd inn í komandi ári. Hettar leggur eitt ávíst trýst á kommununa hvat grundstykkjum viðvíkur.

Teknisk mál
Teknisk mál eru nógv tey flestu í bygdaráðsarbeiðinum. Sum upplýst í kunningarskrivinum frá 2001 hevur tekniska nevnd saman við s/pf Westec arbeitt við broytingum av byggisamtykt fyri Sørvágs kommunu. Ætlanin varð at arbeiðið skuldi verða liðugt til várs, men av tí at hetta er sera umfatandi, -bæði hvat plani, teksti og viðgerð annars viðvíkur-, varð uppskotið endaliga samtykt á fundi 28.11.02. Uppskotið verður nú lýst alment, og verður hettar gjørt á tann hátt at byggi-samtyktin verður alment løgd fram í 3 vikur, og at mótmælast kann í 3 mánaðar. Síðan verða møgulig mótmæli viðgjørd av bygdaráðnum. Mótmæli sum bygdaráðið ikki gongur á møti, verða saman við bygdaplaninum send til býðarskipanarnevndina.

Sum áður nevnt er hettar eitt sera drúgt arbeiði. Her er talan um at leggja økir av 20 ár fram í tíðina, og er tað tí ikki nøkur løtt uppgáva, tá hugsa verður um at Sørvágur so gott sum øll er ognarbygd. Komið verður inn á ognarviðurskifti hjá fólki, men skal menningin í bygdini halda áfram, so er neyðugt at hava eina langtíðarætlan, og her kemst ikki undan at koma inn á ognaðrviðurskifti, men vónandi hevur ognarar forstáðilsi fyri hesum.

Roknast kann við at meginparturin av komandi ári ferð til at fáa bygdaplanin uppá pláss, samráðingar skulu takast upp við partarnar, men hetta má taka tað tíð tað tekur.

Í síðsta kunningarskrivi bleiv nevnt at arbeitt varð við at skipað viðurskiftini úti á havnaøkinum, tað vil siga fjørðuna og broytta vegaførðing út á havnaøkið, hettar arbeiðið er ikki komið uppá pláss, men verður lýst av nýggjum saman við bygdaplaninum.

Ikki allar ætlanir á tíð tekniska økinum vóru gjøgnumførdar sum ætla, val meir skuldi asfalterast í ár, men orsakað av at tunnilin um Vestmannasund bleiv liðugur einar 4-5 mánaðar áðrenn tíðina bleiv tað mesta asfaltarbeiði í Vágum hjá landsverkfrøðinginum útsett til várs aftur.

Komandi ár eru 4,9 mill avsettar til íløgur, og verða hesar brúktar til at betra um umhvørvið hjá borgarunum, hvar og til hvat hesin peningur er avsettur sæst á fíggjarætlanini hjá kommununi fyri 2003, sum er almenn.

Sum nakað nýtt skulu allar bústaðar- og vinnueindir, hús, bygningar, grundstykki og almenn tilhaldsstøð verða tillutað eina adressu, í hesum sambandi hevur kommunan sett ein arbeiðsbólk at gera uppskot um gøtunøvn. Í arbeiðsbólkinum eru: Regin Jespersen, Herálvur Jacobsen, Høgni Nielsen, Sonni Jacobsen og Suni Jacobsen. Nakrir fundir hava verið, og hava fleiri áhugaverd gøtunøvn verið uppi og vent. Persónliga vanti eg at hettar verður eitt mál sum far nógva umrøðu í komandi ári, fleiri nøvn verða strikað, og nýggj eru komin undan kavi, nevndini varð álagt at koma við uppskoti, seinast í apríl 2003.

Dagtilboð og umlatting
Sum bygdafólkinum kunnugt hevur dagtilboð verið í Sørvágs skúla síðan 1999. Frá byrjan var semja um at loysnin í skúlanum bert var ein fyribils, og hevur kommunan síðani arbeitt við at finna eina varandi loysn. Tá skúlastýrið fyri einum árið síðan gjørdi vart við at skúlin hevði brúk fyri hølunum, varð avgjørt at kannað fleiri ymiskar møguleikar, og á fundi 4. nov. samtykti kommunan at keypa húsini hjá Eli frá Jákup og Jóan Pauli Joensen, til endamálið.



Partar av húsunum eru í vánaligum standi, og hevur kommunan tí valt at bróta ein part niður, og byggja upp av nýggjum og er gjørt uppskot til umbygging og innrætting sum umfatar vardan verkstað í niðaru hæddini, og umlættingar-møguleikum í ovaru hæddini.

Fyrst í komandi ári verður støða tikin til sjálva byggingina, og tá húsið stendur liðugt, leigar kommunan serforsorgini bygningin.
Við hesum verður roknað við at ein virðulig loysn er fingin á økinum, sum nøktar tørvin nógv ár fram í tíðina.

Havnaøkið
Síðan kreppuárini tá so gott sum alt virksemi á havnaøkinum var niðurlagt, hevur virksemi á havnaøkinum verið í støðugari menning, fiskaarbeiði er tikið uppaftur sum øllum kunnugt, og í komandi ár er ætlanin at økja eitt sindur um virksemi hjá Vestís seafood, onkrar smærri broytingar á sjálvum virkinum eru eisini ætlanir um at gera.

Laksaalingin og slakt av laksi hevur eisini hesi seinastu árini økt um virksemi á havnaøkinum. Í farna ári eru slaktað 3.600 tons fyri eitt virði uppá ca 65-70mill. Í komandi ári verður roknað við at 4.000 tons verða slaktað, prísurin á laksi hevur verið eitt sindur ójavnur so árið hevur ikki roynst so gott sum man kundi hugsa sær.

Ì 1998 byrjaði Vinjard Joensen at taka ímóti fiski í leigaða pakkhúsinum hjá Hugo Fjørðoy. Fyrsta árið bleiv tikið ímóti 440 tonsum, í ár eru 3.500 tons komin uppá land, men ætlanin er ikki at steðga her, bæði ísvirkið og handilsbygningurin hjá N.Niclasen eru keypt. Ísvirkið sum hevur fingið eina høvuðsumvæling verður vantandi klárt at taka í brúk í januarmánað, meðan handilsbygningurin sum skal hava eina umbygging vónandi verður klárur at takað ímóti fiski í marsmánað, fyrsta árið verður roknað við at 7.000 tons koma uppá land.

Hvat fiskiflotanum viðvíkur, so hevur hesin kanska tað besta árið nakrantíð, so sigast má at her grør um gangandi fót.

Hvat sjálvum havnøkinum viðvíkur hevur kommunan gjørt nakrar ábøtur á havnalagnum, styrkt er um træbryggjuna við einum nýggjum betongmúri, so træverkið nú skuldi verið trygt, eisini er platturin brotin upp og stoyptur av nýggjum, hettar arbeiðið bleiv seinkað, millumannað av persónum, sum ikki hildu kommununa hava rætt at gerða tað sum nú er gjørt.

Ein nýggjur krani er keyptur til landing av teimum smærru bátunum, kranin er keyptur frá J.K.Joensen, og eru menn vælnøgdir við henda krana.

Ì komandi ár hevur kommunan eisini ætlanir um aðrar ábøtur á havnaøkinum, nú virksemið fer at økjast.